**Býráðsfundur 27.05.2024 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | Avboð |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 44/2024 – Normering í Frítíðarskúlanum 2024/2025 | ALMENT |
| Mál nr. 45/2024 – Umsókn um fleiri tímar til kvøldskúlan | ALMENT |
| Mál nr. 46/2024 – Økistónar | ALMENT |
| Mál nr. 47/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 48/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 49/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Gunnar Højgaard | ALMENT |
| Mál nr. 50/2024 – Umsókn um marknaumskipan – Marjun og Haldor Gaardbo | ALMENT |
| Mál nr. 51/2024 – Útbjóðing av jørð undir Nesinum | ALMENT |
| Mál nr. 52/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 53/2024 – Roknskapur 2023 hjá Nes kommunu | ALMENT |
| Mál nr. 54/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 55/2024 – | AFTURLATIÐ |

*Borgarstjórin bað um loyvi at seta mál nr. 56 á skránna. Tað hevði ikki verið lýst. Tað var einmælt samtykt.*

| | |
|---|---|
| Mál nr. 56/2024 – | AFTURLATIÐ |

**Mál nr. 44/2024 – Normering í Frítíðarskúlanum 2024/2025 ALMENT**
J. nr.: 1802-13-2024

Í samband við innrætting av nýggjari stovu í Frítíðarskúlanum hevur leiðarin sett fram ynski um at fáa hægri normering, so at fleiri starvsfólk kunnu setast.

Komandi árgangur, sum kemur inn aftaná summarferiuna, er stórur, og tí er sambært leiðaranum brúk fyri bæði betri hølisumstøðum og samsvarandi starvsfólkaorku.

Leiðarin í Frítíðarskúlanum kemur á fundin fyri at greiða frá.

Leiðslan í Frítíðarskúlanum vísti á arbeiðið á stovninum og arbeiðsorkuna, sum tað krevur. Serliga varð tosað um Samspíran og arbeiðið við at menna og fyrireika børnini til skúlan. Hetta krevur fyrireiking. Eisini varð víst á, at nýggja stovan, sum verður innrættað í kjallaranum, skal brúkast sum ein sjálvstøðug stova, og tí er neyðugt við fleiri starvsfólkum, so at stovurnar kunnu verða væl mannaðar. Samanumtikið er ynski frá Frítíðarskúlanum at fáa 90 tímar um vikuna til hvørja stovu í Samspíranum, tilsamans 180 tímar. Í verandi løtu hevur Samspírin 144 tímar.

Um tímatalið verður hækkað samsvarandi barnatalinum og vanligu normeringini á 6,0 eigur Samspírin at fáa 162 tímar í 2024/2025, og Frítíðarskúlin eigur at fara frá 129 tímum upp í 139 tímar. Út frá hesi hækkini vildi starvsfólkatalið vaksið 0,7.

**Á fundi, tann 14.05.2024, mælir Trivnaðarnevndin til at játta fígging til eitt 1,0 ársverk afturat til Frítíðarskúlan frá 15.08.2024 til 31.12.2024. Tilmælið hjá Trivnaðarnevndini er serliga grundað á hølisviðurskiftini í Frítíðarskúlanum, men skal ikki skiljast sum ein yvirskipað hækking/broyting av normeringini.**

**Á fundi, tann 21.05.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og at fíggingin verður tikin av stovninum "Frítíðarskúlin". Meirjáttanin á stovninum verður tikin við í reguleringum í juni.**

**Tilmælini hjá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 45/2024 – Umsókn um fleiri tímar til kvøldskúlan ALMENT**
J. nr.: 2005-1-2023

Í teldubrævi, dagfest tann 08.04.2024, søkir kvøldskúlaleiðarin um at fáa 100 tímar afturat til kvøldskúlan til skúlaárið 2024/2025. Tvs at samlaða tímatalið fer úr 1300 uppá 1400 tímar. Leiðarin leggur afturat, at kvøldskúlin er væl umtóktur við góðari uppmøting, og hann vil halda fast við eitt høgt støði.

**Á fundi, tann 14.05.2024, mælir Mentanarnevndin til at játta Tofta kvøldskúla 100 eyka tímar til skúlaárið 2024/2025.**

Væntandi gevur hetta eina eyka útreiðslu á kr. 32.000.

**Á fundi, tann 21.05.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og at fíggingin á kr. 32.000 verður tikin av stovninum "Kvøld- og listaskúlar".**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 46/2024 – Økistónar ALMENT**
J. nr.: 2201-1-2024

Á borgarstjórafundinum 8. mars í Kommunufelagnum vitjaði Tónleikasamband Føroya og hevði framløgu um hugskotið, Økistónar.
Økistónar er ein alment stuðlað konsertskipan, ið er ætlað lokalum konsertfyriskiparum og tónleikarum. Skipanin skal stuðla undir, at fyriskiparar fáa fíggjarligar fyritreytir til at skipa fyri umleið 200 konsertum árliga kring allar Føroyar. Væntandi kostar hetta umleið 1,3 mió. kr um árið, harav landið umvegis Tónleikasamband Føroya játtar 650.000 kr. um árið.

Lagt er upp til, at kommunurnar játta aðrar 650.000 kr. til skipanina, ella umleið 12 kr. pr borgara ella 1 kr. pr. íbúgva pr mánað.
Kostnaður fyri 2024 er tó bert fyri ¼ ár ella 3 kr. pr. borgara. Fleiri kommunur hava givið tilsøgn um at játta pening til skipanina, men Tónleikasamband Føroya hevur brúk fyri at vita ítøkiliga, hvussu nógvar kommunur vilja vera við í tiltakinum fyri at gera eina endaliga ætlan fyri skipanina.

Ætlanin er at skipa ein arbeiðsbólk innan mánaðarskiftið, sum skal gera eitt regluverk fyri skipanina. Kommunufelagið luttekur kommunanna vegna í arbeiðinum. Arbeiðið skal vera liðugt innan 1. juni 2024, tá ið ætlanin er, at konsertfyriskiparar skulu kunna søkja um stuðul til at skipa fyri konsertum.

**Á fundi, tann 14.05.2024, mælir Mentanarnevndin til at taka undir við at Nes kommuna er við í verkætlanini "Økistónar".**

**Á fundi, tann 21.05.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og at taka fíggingina fyri 2024 á kr. 4.650 av stovninum "Stuðul til mentan".**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 49/2024 – Umsókn um byggiloyvi – Gunnar Højgaard ALMENT**
J. nr.: 1201-17-2024

Í teldubrævi, dagfest tann 12.04.2024, søkir Gunnar Árnason Højgaard um byggiloyvi til íbúðarhús á matr. nr. 357d á Hjallavegi 6 á Toftum.

Talan er um íbúðarhús í ovaru síðu av vegnum, í tveimum hæddum, við hvør síni búeind á hvørjari hædd.
Íbúðin í niðaru hædd hevur inngongd beinleiðis frá veghædd, meðan atkoman til ovaru búeindina er umvegis trappur upp í ovaru hædd.

Sambært innsendu tekningunum, eru parkeringsviðurskiftini nøktandi.

Byggistigið og nýtslustigið eru í lagi.

Tekniski leiðarin metur, at eingi frávik eru í umsóknini um byggiloyvi.
Tískil hevur umsøkjarin fingið fyribils byggiloyvi, sum fevnir um loyvið at stoypa sokkulin.
Fyribilsloyvið er útskrivað, soleiðis at sokkulin kann verða herðaður nokk til at seta elementini á seinni í summar.

Ávís viðurskifti skulu nágreinast nærri, áðrenn endaligt byggiloyvi verður givið – tískil, biður tekniski leiðarin um, at tekniska deild fær heimild at avgreiða væntandi ivamálini, saman við umsøkjaranum, og síðan útskriva byggiloyvið.

**Á fundi, tann 16.05.2024, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi sambært átekning tann 29.04.2024.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 50/2024 – Umsókn um marknaumskipan – Marjun og Haldor Gaardbo ALMENT**
J. nr.: 1205-8-2024

Í umsókn dagfest, tann 02.04.2024, søkja Marjun og Haldor Gaardbo um marknaumskipan á matr. nr. 412 Toftir.

Endamálið er at fáa rætta markið upp, so at túnið niðanfyri sethús teirra kemur uppí matrikkulin. Eisini verður markið til grannan rættað, so at grannin fær alla sína omankoyring í sín matrikkul.

**Á fundi, tann 09.04.2024, mælir Tekniska nevnd til at arbeiða víðari við málinum.**

Tekniska deild hevur í samráð við umsøkjarnar, viðgjørt umbøn um at fáa skipað marknaviðurskiftini rundanum ogn teirra matr. nr. 412 á Toftum.

Tekniska deild mælir tískil Teknisku nevnd til at ganga umsóknini á møti, við støði í viðheftu umsóknartilfarinum.

**Á fundi, tann 16.05.2024, mælir Tekniska nevnd til at viðmæla marknaumskpanini.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 51/2024 – Útbjóðing av jørð undir Nesinum ALMENT**
J. nr.: 1205-9-2024

Vísandi til útbjóðingartilfar í samband við útbjóðing av jørð á Regnavegnum og Undir Nesinum, er eisini ætlanin at bjóða út meira jørð undir Nesinum fyri sama prís og eftir sama leisti sum áður.

**Á fundi, tann 16.05.2024, mælir Tekniska nevnd til umsitingin fær heimild at avgreiða útbjóðingina eftir áður nýtta leisti.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

<u>**Mál nr. 53/2024 – Roknskapur 2023 hjá Nes kommunu ALMENT**</u>

<u>J. nr.: 1107-2-2022</u>

Uppskot til ársroknskap hjá Nes kommunu 2023 er komið til góðkenningar.

**Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 2023**

| | | | **Játtan** | | | **Roknskapur** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | **Rakstur og útlán** | | | **Rakstur og útlán** | | |
| Túsund kr. | | | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | | **5.973** | **0** | **-** | **6.411** | **0** | **0** |
| | 11. | Felagsútreiðslur | 5.973 | - | - | 6.411 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | | **22.734** | **0** | 70 | **22.420** | **0** | 49 |
| | 20. | Heilsumál | 1.796 | - | 70 | 1.795 | - | 11 |
| | 21. | Almannamál | 20.938 | - | - | 20.624 | - | 38 |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | | **15.052** | **-** | **650** | **14.704** | **-** | **830** |
| | 24. | Mentan | 350 | - | - | 350 | - | - |
| | 26. | Barnaansing | 14.702 | - | 650 | 14.354 | - | 830 |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | | **5.135** | **-** | **2.600** | **5.115** | **-** | **2.371** |
| | 23. | Útbúgving og gransking | 5.135 | - | 2.600 | 5.115 | - | 2.371 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | | **5.952** | **0** | **9.445** | **5.887** | **0** | **8.184** |
| | 23. | Útbúgving og gransking | 770 | - | - | 742 | - | - |
| | 24. | Mentan | 5.182 | - | 9.445 | 5.145 | - | 8.184 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | | **7.894** | **-** | **2.158** | **8.264** | **-** | **2.904** |
| | 11. | Felagsútreiðslur | 1.065 | - | 280 | 978 | - | 389 |
| | 22. | Íbúðarmál | - | - | -3.689 | - | - | -1.381 |
| | 24. | Mentan | 263 | - | 200 | 268 | - | 139 |
| | 30. | Umhvørvi | 1.561 | - | 2.319 | 1.621 | - | 1.304 |
| | 38. | Samferðsla og samskifti | 5.005 | - | 3.048 | 5.397 | - | 2.453 |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | | **3.810** | **-** | **12.338** | **3.856** | **-** | **7.215** |
| | 30. | Umhvørvi | 3.411 | - | 12.338 | 3.278 | - | - |
| | 31. | Tilbúgving | 443 | - | 119 | 443 | - | 119 |
| | 32. | Ráevnisvinna | 154 | - | - | 190 | - | - |
| | 37. | Handil og vinna annars | 70 | - | - | 103 | - | - |
| | 38. | Samferðsla og samskifti | -268 | - | 12.219 | -158 | - | 7.096 |
| **Tilsamans** | | | **66.550** | **0** | **27.261** | **66.658** | **0** | **21.552** |
| § 20. | 22. | Íbúðarmál | 1.650 | - | - | 1.625 | - | - |
| § 20. | 35. | Sjóvinna | - | - | - | - | - | - |
| § 20. | 50. | Rentur | 797 | - | - | 802 | - | - |
| § 20. | 52. | Skattir og avgjøld | - | 74.334 | - | - | 82.578 | - |
| Tilsamans | | | 68.997 | 74.334 | 27.261 | 69.084 | 82.578 | 21.552 |
| Yvirskot | | | - | 5.337 | - | - | 13.494 | - |
| | | | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | | **-** | **-21.924** | **-** | **-** | **-8.058** | **-** |
| § 25. | 60. | Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | 0 | 7.834 | - | -721 | 1.726 | - |
| **Nettokassaúrslit** | | | **-** | **-14.090** | **-14.090** | **-721** | **-6.333** | **-5.612** |
| § 25. | 62. | Afturgjald av skuld | 2.910 | - | - | 2.910 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | | | **2.910** | **-14.090** | **-17.000** | **2.189** | -6.333 | **-8.522** |

Fígging:

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| § 25. | 64. | Útvegan av gjaldføri | - | 17.000 | - | - | 8.522 | - |
| Fígging íalt: | | | - | 17.000 | 17.000 | - | 8.522 | 8.522 |
| **Samanlagt** | | | **2.910** | **2.910** | **-** | **2.189** | **2.189** | **-** |

# Fíggjarstøða

| **Ogn** | **2023** | **2022** |
|---|---|---|
| **Goymslur og áogn** | **7.888** | **7.434** |
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t. | 726 | 373 |
| Skatta-, toll- o.t. skuldarar | 535 | 548 |
| Skuld hjá stovnum og myndugleikum | 6.600 | 6.410 |
| Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 27 | 106 |
| **Virðisbrøv og tøkur peningur** | **157** | **1.328** |
| Banka- og girokontur | 147 | 1.311 |
| Kassakontur | 9 | 17 |
| **Ogn tilsamans** | **8.044** | **8.765** |

| **Útjavningarkonta og skuld** | **2023** | **2022** |
|---|---|---|
| **Útjavningarkonta** | **-36.105** | **-28.047** |
| Salda primo | -28.047 | -30.037 |
| Rakstrar-, løgu og útlánsúrslit | -8.058 | 1.990 |
| **Langfreistað skuld** | **37.257** | **31.646** |
| Innanlandsskuld, vanlig lán | 37.257 | 31.646 |
| **Stuttfreistað skuld** | **6.892** | **5.167** |
| Skuld, sum er greidd til útgjaldingar | 5.180 | 4.962 |
| Skuld, avgjøld | -194 | -935 |

| | | |
|---|---|---|
| Varðveitingar og trygdir | 38 | 35 |
| Tíðaravmarkan | 596 | 0 |
| Onnur stuttfreistað skuld | 1.272 | 1.105 |
| | | |
| **Útjavningarkonta og skuld tilsamans** | **8.044** | **8.765** |

**Á fundi, tann 21.05.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum sum hann er uppsettur.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

Kunning um ársroknskapin 2023
Staðfest varð, at samlaðu inntøkurnar fyri 2023 vóru væl hægri enn roknað varð við í fíggjarætlanini. Skattainntøkan hjá kommununi í 2023, eftir frádrátt av rentustuðli, var 81,0 mió. kr., sum er 7,8 mió. kr. hægri enn í 2022. Í fíggjarætlanini fyri 2023 varð roknað við eini nettoskattainntøku á 72,7 mió. kr. Sostatt blivu samlaðu inntøkurnar í 2023 8,3 mió. kr. betri enn mett.
Samlaðu rakstrarútreiðslurnar í 2023 vóru 66,7 mió. kr., ið er 9,8 mió. kr. meira enn í 2022. Í fíggjarætlanini fyri 2023 varð roknað við einari samlaðari rakstrarútreiðslu á 66,5 mió. kr. Sostatt blivu samlaðu útreiðslurnar í 2023 áleið sum mett í fíggjarætlanini.
Rakstraravlopið áðrenn íløgur var 13,5 mió. kr., mótvegis 15,6 í 2022. Í fíggjarætlanini var roknað við einum avlopi áðrenn íløgur uppá 5,3 mió. kr. Rakstraravlopið áðrenn íløgur varð sostatt 8,2 mió. kr. betri enn mett í fíggjarætlanini.
Samlaðu nettoíløgurnar í 2023 vóru 21,6 mió. kr. Í fíggjarætlanini og eykajáttanum varð roknað við einari nettoíløgu á 27,2 mió. kr. Íløgurnar í 2023 vóru sostatt 5,6 mió. kr. lægri enn játtað. Størsti parturin av íløgunum, ið ikki vóru nýttar í 2023, verða fluttar til 2024.
Samanlagt vísti roknskapurin hall á 8,06 mió. kr. í árinum, samanborið við eitt yvirskot á 2,0 mió. kr. í 2022.
Nettoskuldin hjá Nes kommunu við ársenda 2023 var 36 mió. kr. Kommunur hava ikki loyvi at hava størri nettoskuld enn eina álíkning, sum er árlig skattainntøka (roknað við 23 % í kommunuskattaprosenti), eftirlønarskattur og ávísar flytingar frá landinum. Skuldarmarkið hjá Nes kommunu var pr. 31. desember 2023 85,4 mió. kr. Nettoskuldin hjá Nes kommunu við ársenda 2023 var sostatt 42 % av eini skattaálíkning.

Samandráttur verður latin øllum húsarhaldum í kommununi í næstum.